# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýggjar tíðir á arbeiðsmarknaðinum

Tað eru nýggjar tíðir á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað varð aftur staðfest í dag, tá ið Pedagogfelagið varð sett upp á pláss av fasta gerðarrættinum. Tað hevur leingi verið friðarligt á arbeiðsmarknaðinum. Privatu feløgini á arbeiðsgevarasíðuni og á arbeiðstakarasíðuni á landi og sjógvi hava sáttmálar, og soleiðis hevur tað eisini verið á almenna arbeiðsmarknaðinum. Herfyri undirskrivaðu Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum og fleiri feløg á almenna arbeiðsmarknaðinum undir sáttmála, ið fevnir um tíðarskeiðið 2005-2010.

Talan er um Verkfrøðingafelagið, Arkitektafelagið, Byggifrøðingafelagið og Magistarafelagið. Tað ljóðar, at hesi feløg eru á veg upp í fusionerað felag, Føroya Akademikarafelag, ið ivaleyst fer at líkjast nógv tí danska AC. Tá ið hetta verður veruleiki, verður ivaleyst lættari at samskipa virksemið og harvið eisini lættari at samráðast við Lønardeildina, sum í sínum lagi fer at fáa fyrimun av at samráðast við eitt og ikki fýra feløg. Fyri báðar partar eigur hetta at kennast sum stig rætta vegin. Nýggjar tíðir.

Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið eru í samráðingum. Tað eru nýggjar tíðir á tann hátt, at bæði fiskimenn og reiðara hava valt nýggja leiðslu. Óli Jacobsen og Jákup Sólstein hava mangar ferðir verið í samráðingum, og tað hevur verið eyðkenni, at tað hevur eydnast at gera semju, uttan at talan hevur verið um verkfall ella lockout.

Ásetingarnar siga, at áðrenn tað verður arbeiðssteðgur, skal semingsmaðurin upp í samráðingarnar. Semingsmaðurin hevur verið í sambandi við FF og RF men enn hevur ikki verið nakað serligt at hoyrt um semju og nýggjan sáttmála.

Nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur ofta – bæði áðrenn og aftan á at hann varð valdur – nevnt møguleikan um at leggja flotan, um fiskimenninir ikki fáa meiri burturúr. Serliga verður fokuserað á eftirlønina og á, at skipanin við ALS er órímulig ímóti fiskimonnunum. Tónin er nýggjur. Spurningurin er, um tað fer at eydnast at røkka semja, uttan at flotin verður lagdur.

Pedagogfelagið spældi við musklunum, eftir at teir og kommunalu arbeiðsgevararnir fóru hvør til sítt í gjár. Arbeiðssteðgur varð lýstur frá klokkan 11 í morgun og í eitt samdøgur. Í apríl í fjør varð lóg um fastan gerðarrætt samtykt. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava góðtikið mannagongdina, og í morgun hevur fasti gerðarrætturin kolldømt ætlanina hjá Pedagogfelagnum, og ætlaða verkfallið er avlýst. Skipanin og avgerðin í morgun boða frá nýggjum tíðum á arbeiðsmarknaðinum.

Í kvøld skipar Pedagogfelagið fyri fundi í Miðlahúsinum, har politisku flokkarnir fara at viðgera spurningar, sum hava við arbeiðsøkini hjá pedagogunum at gera.

**Sosialurin**

## Latið Suðurøkið fáa blokkin í eitt ár

JOEL UNDIR LEITINUM



**Sandoyartunnilin kostar lítið meira enn blokkurin er í eitt ár. Vit kunnu velja millum at brúka blokkin til rakstur og tengja Føroyar meira at Danmark, ella brúka hann til íløgur**

Tosið um sandoyartunnilin er farið av sporinum. Einstakir politikarar, og politiskir spírar, gera sær dælt av at ríða á einari populistiskari bylgju um "vælferð heldur enn tunnil".

Latum okkum fara eitt vet aftur í tíðina, tá skjøtil varð settur á Visión 2015. Sjálvur var eg partur av bólkinum "infrakervið". Arbeiðssetningurin byrjar við hesum: "Eitt gott infrakervi í Føroyum og millum Føroya og útheimin er týdningamikil fyritreyt fyri trivnaði hjá borgarum og vinnulívi og fyri at javnstilla ymsu økini í landinum." Bólkurin tulkaði henda setning soleiðis, at talan var um "allar borgarar – øllum vinnulívi – øllum landinum".

Sum er fáa Føroyar gott 600 milliónir kr. um árið í stuðli úr Danmark. Hetta er næstan ein sandoyartunnil hvørt ár. Henda inntøka er ekstraordiner, og haldi eg ikki at hon átti at komið inn í raksturin. Blokkstuðulin eigur at verða brúktur til at útbyggja hetta samfelagið til at kunna virka optimalt, eftir at loyst er. Hví so ikki taka "bara eitt ár" av blokkstuðli og brúka hann upp á fast samband við Sandoynna?

Tað eru ikki pengar, sum mangla. Verður sandoyartunnilin fíggjaður yvir eitt langt áramál er talan bert um einar 40 mill. um árið. Sandoyartunnilin er ikki tað, sum forðar okkum fyri at byggja nýggjan studentaskúla. Heldur ikki at byggja eitt fullkomuliga nýtt fróðskaparsetur – sum eg haldi átti at verði bygt ongantíð ov skjótt við einum mikið breiðari tilboði enn verandi.

Tað er ikki ein spurningur um peningin, men meir um, at tað fór at yvirupphita búskapin. At samfelagið er yvirupphitað hevur lítið við sandoyartunnilin at gera. Eini 40 fólk verða í støðugum arbeiði og einasta, sum rættuliga kann ávirkast er, at útboðið av lastbilum verður minni.

Lesi í bløðunum at 3 x Kári og Annika Olsen halda "tað er ov dýrt" og vilja hava "vælferð heldur enn tunnlar". Tað kann ikki merkja annað enn, at tey vilja hækka útreiðslurnar til raksturin enn meira. Seinast nevnda vil enntá hava eitt "vælferðarmálaráð". Komi tá í hug setningin hjá amerikanarunum: "Nice – but not needed" (fyri ikki at siga "nakað forferdiligt fjas"). Tað merkir, at hesi vilja ikki leggja kostnaðin av Sandoyartunnlinum afturat yvirskotinum á fíggjarlógini, men vilja spræna peningin út í samfelagið annars, við enn hægri yvirhiting sum fylgju.

Tað kann vera so ómetaliga nógv annað, sum er ov dýrt. Tað er ov dýrt at byggja eina miðnámsskúla í Hovi heldur enn í Vági. Tað er ov dýrt at hava Smyril siglandi. Tað er ov dýrt at hava 3 sjúkrahús. Tað er ov dýrt at hava sjómanna- og handverkarafrádrátt. Í veruleikanum er tað ov dýrt at búgva ymsastaðni í Føroyum. Hví skjóta tit ikki upp at byggja eitt háhús til 49.000 fólk, við verksmiðju í kjallaranum og hentleikum annars? Tað kundi ligið við flogvøllin og so kundu vit stongt restina av Føroyum, tí tann parturin er ov dýrur.

Tey, sum tóku undir við føstum sambandi við Sandoynna hava rós uppiborið. Tey duga at síggja tað neyðuga í at binda Sandoynna og Suðuroynna í Megin-føroyar og fylgja visión 2015-ætlanini. Gera samfelagið størri og harvið helst fjølbroyttari at liva í. Somu, sum eru ímóti føstum sambandi til sunnaru Føroyar, vóru ímóti føstum sambandi við Vágar og Norðoyggjar.

Tað sum tó undraði meg allarmest undir viðgerðini av føstum sambandi við Sandoynna var, at Tjóðveldið ikki allur sum ein tóku undir við uppskotinum. Vil Tjóðveldið Føroyum og okkum her búgva væl, má meira stirðil til ikki at brúka blokkin til rakstur, men íløgur og yvirskot annars. Annað hevur lítið trúvirði og gevur heldur ikki meining, um flokkurin ynskir loysing. Tjóðveldi tosar um, at vit saktans klára okkum uttan blokkin. Er hetta so, klára vit eisini at seta eitt ára blokkstuðul av til sandoyartunnilin. Annars hongur ikki saman.

Brúkið blokkin til at gera Føroyar "væl virkandi" eftir loysingina.

Latum okkum tí fegnast um og stuðla teimum politakarum, sum vilja menna infrakervið, betra um flytføri og gera tað gott hjá "øllum" føroyingum at búgva í Føroyum.

## Tøkk til Jan Christiansen

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Fari at takka Jan Christiansen fyrrverandi borgarstjóra fyri, at hann so fyndarglaður kunngerð listan yvir øll málini, sum vóru avgreidd undir seinastu býráðssamgongu.

Jan Christiansen byrjar greinina við at siga fólki, hvørjum nevndum Heðin Mortensen var formaður í ella sat í, og heldur síðan fram við einum longum lista av loystum og avgreiddum málum, ið eg sum nevndarformaður og nevndarlimur hevði ábyrgdina av.

Hesi mál vóru øll væl og virðiliga avgreidd til gleði og gagns fyri øll í kommununi.

Takk fyri Jan Christiansen. Undirritaði var sjálvur alt ov lítillátin til at seta handa langa listan á prent.

Men Jan, hvat gjørdi tú hesi fýra árini? Alt ov nógv lá eftir - ógjørt. Minnist meg rætt, formáddi tú ikki at seta í verk samtyktar uppgávur fyri áleið 70 mió. kr., sum svaraði til eina slaka árliga íløguætlan tá. Óheppið, at hetta skal verða neyðugt at gera nú, tá ið handverkarar hava úr at gera.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.